## DAGSINS MEINING

# Varpið fult ljós á

Hóast hann sigur seg ikki kenna til nakað trýst í málinum, so hevur løgmaður nú gjørt av, at ein løgfrøðislig kanning skal gerast av embætisførsluni hjá Bjarna Djurholm í sambandi við sonevnda Dagmar-málið.

Enn hevur løgmaður ikki boðað frá, hvør kanningarsetningurin verður. Men tað stendur púrasta greitt, at skuldsetingarnar í málinum eru av slíkum slag, at hesar mugu kannast til botns.

Tá forkvinnan í einum av týdningarmestu grunnunum í landinum setir fram somikið grovar ákærur móti fleiri persónum í týðandi almennum størvum og álitissessum, kann Føroya Fólk ikki liva við, at bara partar av málinum verða kannaðir.

Nú er kanningin ov drúgv at endurgeva á hesum reglum, men millum tað, sum Dagmar S. Joensen førir fram er: At lógin um alment innlit er brotin. At hetta er gjørt við sikti í sølutilgongdini av Faroe Seafood. At trúnaðarupplýsingar við vilja eru liknar til miðlarnar fyri skaða umdømi hjá Dagmar S. Joensen. At navngivnir limir í Framtaksgrunninum eru óálítandi og arbeiða beinleiðis destruktivt. Og so ikki minst, at landsstýrismaðurin skal hava misnýtt embæti sítt, eins og hann hevur trýst almennan leiðara úr starvi sínum.

Somikið grovar eru hesar ákærur, at einki annað enn ein verulig greiða á øllum spurningum kann metast sum nøktandi svar. Og so er bara at vóna, at kanningin verður framd skjótt og væl í verki, soleiðis at ivamálini, sum helst skaða allar partar, kunnu beinast av vegnum sum skjótast.

**Sosialurin**

# Et godt initiativ fra Færøerne

**PIA LARSEN, MF,(V)**
formand for Folketingets Færøudvalg

Det glæder mig meget at erfare, at det færøske Lagting har givet grønt lys for, at Færøerne søger om medlemskab i Den Europæiske Frihandelssammenslutning, EFTA. Der kan være delte meninger om EFTA eller EU er det rette sted for Færøerne at søge om optagelse, men det afgørende er, at der er blevet truffet en beslutning i Lagtinget. Og da Folketinget for snart et år siden vedtog loven om *Færøernes landsstyres indgåelse af folkeretlige aftaler*, var det netop et klart udtryk for et ønske om få rigsfællesskabet moderniseret. Mulighederne for at få det færøske landsstyre og Lagtinget inddraget endnu mere i de politiske beslutninger, der vedrører Færøerne, skulle forbedres.

Med vedtagelsen af loven fik Færøerne beslutningskompetence i internationale forhandlinger indenfor områder såsom fiskeri, handelsforhold, kultur, undervisning, sociale forhold og andre lignende områder, der har en særlig interesse for Færøerne, og det var en klar udvidelse af landsstyrets kompetence. Så at Lagtinget nu er blevet enig om at søge medlemskab i EFTA er et udtryk for, at den ønskede moderniseringen af rigsfællesskabet begynder at vise sig.

I denne forbindelse vil jeg gerne slå fast, at den danske regering på ingen måde modarbejder færøske bestræbelser for mere selvstændighed – selvom nogen måtte have den opfattelse. Udgangspunktet for den danske regerings politik skal derimod findes i princippet om folkenes selvbestemmelsesret. Så kommer der en dag et folkeligt baseret ønske fra Færøerne om fuld selvstændighed, så er jeg fuldstændigt overbevist om, at der vil blive støttet op omkring et sådant ønske fra hele Folketinget.

# Alt gott um tað

**JÓGVAN VIÐ KELDU**
løgtingsmaður



**Vit eru ikki í aftara enda, tí vit hava bygt vegir ella tunlar. Sjálvandi skal tunnilin til Sandoyar setast í verk! Skálafjarðartunnilin verður sjálvberandi og ikki landskassafíggjaður**

Orsøkin til at eg havi valt hesa yvirskriftina er, at tá fólk siga, "alt gott um tað", er vanliga eitt og annað hesi hava verið ímóti, men sum tó gjørdist til succes ella fólkaogn og soleiðis vilja tey kortini eiga nakað í tí.

Seinastu tíðina er staðfest, at fólkaskúlafrálæran hevur ligið í vanlagnu, eldrapolitikkurin á skeivum spori, hægru skúlarnir, granskingarførleikin og fróðskaparsetrið hava í áravís mett seg at hava ov lítlan pening og ikki minst at sosialu- og heilsuviðurskiftini annars rukku ikki mát.

**Útbyggingar úti um landið onga skuld**

At vit eru í aftara enda í so týðandi viðurskiftum, sum verða hámett í londum uttan um okkum, og sum eisini eru tað hjá okkum, fáa útbyggingar av landsins undirstøðukervi, eitt nú Norðoya- og Vágatunnilin og at skjøtil verður settur á Sandoyartunnilin, skuldina fyri frá politikarum og greinskrivarum úr høvuðsstaðnum.

Ein og hvør, ið fylgir við, veit, at hetta fyri tað mesta eru veik, einki-sigandi og naiv uppáhald sum verða sett fram, bara fyri at sleppa sær undan ábyrgd fyri at rakstrarøkini eru vorðin ov dýr á omanfyrinevndu tænastum eftir áralongum eftirgevingum, sum fyri stóran part eru komnar av miðsavningum og at raksturin soleiðis gjørdist dýrari enn væntað.

**Tosaðu tey intelektuellu alt til deyðis**

Umráðandi er nú, at arbeiðið við Sandoyartunlinum heldur fram, og at politiski myndugleikin, Havnarfjølmiðlarnir ella greinskrivarar nú ikki aftur sleppa at stinga forðingar inn. Skálafjarðartunnilin koyrir uttanfyri landskassaíløgurnar, tað kunnu vit eisini fegnast um.

Eru vit aftarlaga í fyrr nevndu málum, so kunnu vit tó takka hugsjónar-politikarum og sterkum kreftum í kommunupolitiska kervinum fyri, at vit í dag standa hampuliga sterkir í vega- og tunnilsútbyggingum fyri at savna allar Føroyar. Áhugaverdi spurningurin er nú, vóru tað tey intelektuellu, ið tosaðu allan kvalitet til deyðis uttan at handla?

# Til Útvarp Føroya

**SÓLVIT SIMONSEN**



Eg kom úr kirkju Kristi himmalferðardag. Áðrenn eg sessaðist koyrdi eg radio frá, tí at sunnudagar er ofta góður lesnaður áðrenn sendingina hjá Janusi Mohr. Ja, nú er hann givin, so hann eigur í minsta lagi eina stóra tøkk frá okkum føroyingum fyri tað vælaverk, hann hevur ríkað okkum við.

Men aftur til útvarpið og lesnaðin. Tað, sum eg hoyrdi, var ein lesnaður við illbønum, við ljótum orðum og við fúlum orðum. Í kirkjuni hevði eg sjálvur staðið og lisin ein av teimum lestrunum hjá J. Dahl, sum ríka okkum føroyingar, og sum blíva við at passa til hvørja tíð.

Eg trúði ikki mínum egnu oyrum. Er hatta Kristi himmalferðar lesnaður, sum okkara dýrabæri mentanarmiðil hevur at bera fram. Hvat sigur stjórin, eigur hatta at vera soleiðis. Tá ið eg var ungur, plagdi eg at spæla sjónleik. Tað, sum sagt varð við okkum, var at vit skuldu ikki brúka illbønir, ístaðin skuldu vit bert seta onkur meira kraftig orð inn ímillum, og tað bar væl til. Og hetta vóru eldri fólk higani av Sandi, sum løgdu okkum lag á. Eg meini at útvarpið eigur at ganga undan við at vanda sær um orðini, tí ungdómar og óvitar eru ofta skjótir at taka eftir.

Nú eru bert tveir mánaðir eftir til ólavsøku, har tann ríkasta mentanarløtan, vit eiga, er tá ið skrúðgongan við løgtingsmonnum og øðrum fer í kirkju. Nú er spennandi at vita, hvussu væl teir lurta eftir í kirkjuni um sátt og semju, ella teir leypa aftur upp á borðið eftir einum, sum ikki hevur somu meining.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.